# Kann skapa til meiri arbeiði á fiskavirkjunum í Føroyum

**Tað hevur týdning at varðveita Fiskavirking á Føroyskum hondum, halda nakrir av teimum, sum hava bjóðað upp á tað**

EINSKILJING AV FISKAVIRKING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



– Fiskavirking eigur at verða varðveitt á føroyskum hondum.

Tað halda nakrir av teimum, sum hava bjóðað uppá okkara nógv størstu fiskivinnufyritøku.

Freistin at bjóða upp á Fiskavirking, var úti mánakvøldið, men fyribils er bara upplýst, at eitt samtak av føroyskum reiðurum hava bjóðað.

– Vit halda, at tað er okkara skylda at royna at keypa Fiskavirking, so at tað kann varðveitast á føroyskum hondum, sigur Jónsvein Knudsen, sum er við í samtakinum, ið hevur bjóðað upp á Fiskavirking.

Annars hevur samtakið avtalað, at Tummas Christoperen í Vestmanna skal vera talsmaður fyri samtakið, so Jónsvein Knudsen hevur ikki tær stóru viðmerkingarnar.

Hann váttar kortini, at teir hava bjóðað 80 milliónir upp á Fiskavirking.

### Hava skyldu at bjóða

Hann vísir á, at vit skulu øll liva og virka í Føroyum og tí

*Nakrir føroyskir reiðarar hava bjóðað upp á Føroya Fiskavirking. Eydnast tað teimum at fáa fyritøkuna, halda teir at tað fer at eggja føroyskum bátum at avreiða meiri í Føroyum og at tað sostatt fer at tálmað útflutninginum av óvirkaðum fiski*

heldur hann, at tað beinleiðis er teirra skylda at bjóða upp á virkið.

Hann heldur, at Framtaksgrunnurin kann kanska fáa eitt sindur meiri fyri Fiskavirking frá onkrum útlendingi.

– Men fyri samfelagið er vandi fyri, at tað verður løtuvinningur og at tað hevði loyst seg betri at varðveitt tað á føroyskum hondum, hóast søluprísurin kanska verður eitt sindur lægri.

Jónsvein Knudsen sigur, at verður Fiskavirking varðveitt á føroyskum hondum, kann tað føra til, at meiri fiskur fer at verða avreiddur í Føroyum.

– Tá fara skipini at føla eitt tættari tilknýti til Fiskavirking og tað kann føra til, at tað verður meiri arbeiði á Fiskavirkjunum í Føroyum og at minni fiskur fer at fara óvirkaður av landinum.

– Tað er okkara endamál við at bjóða upp á Fiskavirking, sigur hann.

Tó leggur hann afturat, at tað er ikki beinleiðis nakað teir tráa eftir at fáa fatur á Fiskavirking.

– Eru tað onkrir aðrir føroyingar, sum keypa Fiskavirking, er tað í finasta lagi, men tað hevur týdning at hon verður verandi á føroyskum hondum, sigur Jónsvein Knudsen

Heldur ikki Tummas Christophersen vil siga so nógv um ætlanina. Men hann staðfestir eisini, at eydnast tað teimum at fáa Fiskavirking, fer tað at eggja skipunum til at avreiða í Føroyum og sostatt fer tað at minka um útflutningin av óvirkaðum fiski.

Jónsvein Knudsen sigur, at hóast tað eru reiðarí, sum hava bjóðað upp á Fiskavirking er ikki ætlanin at leggja skip og virki saman.

– Men tað slepst ikki undan einum ávísum tilknýti, sigur hann.

Eisini Tummas Christophersen ásannar, at skipini fara at føla eina størri skyldu at avreiða í Føroyum, tí fáa teir Fiskavirking, verður í hvussu so er ikki avreitt uttanlands, uttan at tað loysir seg væl, leggur hann aftur.

– Hetta er eisini ein spurningur um at varðveita arbeiðið í landinum og tað eigur at hava stóran týdning hjá øllum pørtum, sigur Jònsvein Knudsen.

Hann sigur, at fáa teir Fiskavirking, er tað ikki endamálið at leggja partar í landinum lamnar. Tvørturímóti er ætlanin at varðveita sum mest arbeiði her, sigur hann.

# Prísurin á Fiskavirking farin niður í helvt í eitt ár

**Fyri einum ári síðani kundu Fiskavirking og Fiskasølan verðið seld fyri 160 milliónir, men nú vilja somu menn bara bjóða helvtina av tí**

EINSKILJING AV FISKAVIRKING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Fyri einum ári síðani hevði Framtaksgrunnurin møguleikan at selja Fiskavirking og Fiskasøluna fyri 160 milliónir, men nú er tilboðið farið niður í helvt*

Hevði Framtaksgrunnurin selt Fiskavirking og Fiskasøluna tá ið møguleikin beyðst fyri einum ári síðani, hevði søluprísurin verið tvær ferðir so høgur, sum hann er nú.

Tað vísa tey einastu tølini, sum eru uppl‡st fyri almenninginum, nú Fiskavirking verður selt í næstu framtíð.

Seinasta freist at bjóða upp á Fiskavirking, var mánadagin, men tað einasta, sum er upplýst alment, er, at eitt samtak av føroyskum reiðarum hava bjóðað upp á fyritøkuna.

Teir upplýsa sjálvir, at teir hava bjóðað 80 milliónir, fyri Faroe Seafood, sum umfatar bæði Fiskavirking og tað gomlu Fiskasøluna.

Men fyri einum ári síðani bjóðaðu somu menn 115 milliónir fyri Fiskavirking einsamalt. Samstundis vóru aðrir sinnaðir at keypa Fiskasøluna fyri aðrar 45 milliónir.

Sostatt hevði Framtaksgrunnurin fingið 160 milliónir fyri báðar fyritøkurnar, hevði hann tikið av tilboðunum, sum vóru tá.

Men tað gjørdi hann ikki og síðani hevur gongdin í flakavinnuni verið so vánalig, at nú vilja somu menn bara bjóða 80 milliónir fyri alla fyritøkuna, sum hon er.

### Virðini ikki tey somu

Jónsvein Knudsen, sum er ein av reiðarunum, sum liggja framvið, ásannar, at gongdin í flakavinnuni hevur verið vánalig.

– Men tá ið vit bjóðaðu 115 milliónir fyri Fiskavirking í fjør, høvdu vit als ongan áhuga í Fiskasøluni, tí hana høvdu aðrir bjóðað upp á.

Um hetta fer at føra við sær at teir fara at selja Fiskasøluna burturúr aftur um teir fáa Fiskavirking, kann Jónsvein Knudsen onki siga um.

Tummas Christophersen minnir á, at teir, sum keypa Fiskavirking, fáa ikki bara nøkur virki, tí tey fáa eisini skuldina hjá felagnum.

Ì hesum sambandi kann vísast á, at Fiskasølan og Fiskavirking høvdu eina skuld upp á 39 milliónir í fjør.

Av teimum hevði Fiskavirking einsamalt eitt hall upp á 15,8 milliónir.

Hvussu seinastu tølini síggja út, vilja ætlaðu keypararnir ikki siga, tí tað eru upplýsingar, teir hava fingið í trúnaði.

Men samanumtikið má staðfestast, at flakavinnan á landi er ikki nógv verd í løtuni og tað er ómetaliga tungt hjá virkjunum at fáa endarnar at røkka saman.

– Virðini eru als ikki tey somu longur, staðfestir Jónsvein Knudsen.

Eisini Tummas Christophersen heldur at tað er ov tíðliga at tosa um einstakar lutir og tí kann hann heldur ikki siga, um Fiskasølan verðru seld burturúr aftur.

– Enn vita vit ikki um okkara boð hevur nakran áhuga yvirhøvur, sigur hann.

# Dagmar er tøtt sum fløskan

EINSKILJING AV FISKAVIRKING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Formaðurin í nevndini fyri Framtaksgrunnin, Dagmar S. Joensen vil ikki siga eitt tað einasta orð um ætlanina at einskilja Føroya Fiskavirking.

Hon sigur, at hetta er ein tilgongd, sum skal fara fram í fullum trúnaði og tað heldur Framtaksgrunnurin fast við.

Seinasta freist at bjóða upp á Fiskavirking, var mánadagin. Men formaðurin í Fiskavirking vil onki siga um hvør hevur bjóða ella hvussu nógv boð eru komin. Hon vil heldur ikki siga, um talan er um føroyingar ella útlendingar.

Og hon vil heldur ikki siga, um boðini eru nøktandi.

Tað einasta, hon vil siga, er, at fyri at nevndin í Framtaksgrunninum fer at arbeiða so skjótt við málinum, sum tilber.

Men nær ein avgerð verður tikin, kann hon onki siga um.